# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 26.09.2025 |
| Mál nr.: | 25/13834-20 |
| Málsviðgjørt: | GMM/BL |
| Ummælistíð: | |
| Eftirkannað: | |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd**
(flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 29. mai 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 24, stk. 2, 2. pkt verður orðað soleiðis:
“Tá ið umsøkjarin ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðurlandi, hevur hann skyldu at boða TAKS frá hesum.”

**2.** § 24, stk. 3, 2. pkt. verður orðað soleiðis:
“TAKS rindar kostnaðin av hesum.”

**3.** § 26, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“*Stk. 2.* Hevur persónur givið TAKS skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í § 24, stk. 3 í heilsutrygdarlógini er ásett, at TAKS krevur heilsutrygdargjaldið inn fyri Heilsutrygd, men tað er Heilsutrygd, sum rindar kostnaðin av hesum. Sostatt er tað TAKS, sum skipar og umsitur innkrevjingina av heilsutrygdargjaldinum, og hevur Heilsutrygd ongan leiklut í sjálvari innkrevjingini. Kostnaðurin av hesum verður skrásettur sum útreiðsla á rakstrarjáttanini hjá Heilsutrygd, og er tað harvið eisini stjórin á Heilsutrygd, sum hevur evstu ábyrgd av, hvussu væl TAKS umsitur hesa uppgávu. Hóast tað, hevur stjórin á Heilsutrygd ikki atgongd til inntøkujáttanina og skrásetingar í Búskaparskipan Landsins, sum hava við heilsutrygdargjaldið at gera. Vald og gjald fylgjast sostatt ikki at í hesum føri.

Eisini er vert at nevna, at í fíggjarlógini er heilsutrygdargjaldið flokkað sum ein inntøkujáttan undir § 20 og stendur skrásett undir "20.52.1. Skattainntøkur" og ikki undir "§ 11 Heilsumál", har virksemið hjá Heilsutrygd annars er.

Tann 1. juli 2024 varð heilsutrygdarlógin broytt, soleiðis at persónar, ið eru fevndir av Nordisk konvention om social sikring og sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum landi, men sum ikki kunnu draga gjaldið frá vísandi til skattalógina, kunnu sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum. Hetta hevur havt við sær, at Heilsutrygd hevur ment sína KT-skipan og gjørt tað møguligt hjá borgarum, umvegis Vangan, at søkja um undantak frá at rinda heilsutrygdargjald. TAKS hevur somuleiðis eisini ment sína innkrevjingarskipan til hetta endamálið. Vísandi til heilsutrygdarlógina hevur Heilsutrygd tó rindað fyri kostnaðin av hesum menningararbeiði, og er tað eisini í hesum førinum stjórin á Heilsutrygd, sum í síðsta enda hevur ábyrgd av hesum útreiðslum.

Ymiskir upplýsingar og skjalprógv krevjast fyri at málsviðgera og taka støðu til umsóknina um undantøku frá at rinda heilsutrygdargjald. Heilsutrygd hevur ikki hesar upplýsingarnar og má tí biðja umsøkjaran um tær, og sannlíkt útvega skjalprógv frá TAKS um t.d. skattskyldugu inntøkuna. Við tað, at TAKS eisini skal viðgera hesar somu persónar skattliga, kann væntast, at TAKS longu frammanundan hevur nógvar av hesum upplýsingum, sum skulu til fyri at viðgera undantøk. Heilsutrygd hevur upplýst, at borgarar, sum venda sær til stovnin, undrast eisini, tí teir skilja ikki altíð so væl, at Heilsutrygd ikki hevur upplýsingarnar, sum teir longu hava latið TAKS.

Fyrisitingin av hesum kundi verið gjørd meira einføld, um TAKS, umframt innkrevjingina, eisini fyrisitur málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi og undantøkum. Tá hevði tað verið ein og sami stovnur, sum umsat hesi gjøldini í staðin fyri tveir, sum tað er við verandi skipan. Hetta hevði eisini verið munandi greiðari fyri borgaran, sum tá hevði ein almennan stovn at venda sær til viðvíkjandi heilsutrygdargjaldi, heldur enn tveir.

Harumframt hevur TAKS longu førleikar at málsviðgera og krevja inn gjøld og skatt. Heilsutrygdargjaldið minnir um skatt, tí ein partur av gjaldinum er ávíst prosentgjald av skattskyldugari inntøku. Hetta er á ongan hátt ein kjarnuuppgáva hjá Heilsutrygd, men líkist í nógv størri mun dagliga virkseminum hjá TAKS.

Heilsumálaráðið hevur samskift við TAKS, sum hevur upplýst, at tað hevði verið meira rationelt, um TAKS yvirtók málsviðgerðina av umsóknum um undantak frá

heilsutrygdargjaldinum, sambært kunngerðini um undantøk fyri gjaldsskyldu av heilsutrygdargjaldi.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Í § 24, stk. 3 í galdandi heilsutrygdarlóg er ásett, at TAKS krevur gjaldið inn fyri Heilsutrygd, og at Heilsutrygd rindar kostnaðin av hesum. Í praksis merkir tað, at Heilsutrygd ongan leiklut hevur í innkrevjingini av heilsutrygdargjaldinum, men bert rindar eina ávísa upphædd hvørt ár til TAKS fyri hesa uppgávuna.

Hetta hevur verið mannagongdin síðani Heilsutrygdarlógin kom í gildi 1. januar í 2010. Kostnaðurin av hesum verður skrásettur sum útreiðsla á rakstrarjáttanini hjá Heilsutrygd, og er tað harvið eisini stjórin á Heilsutrygd, sum hevur evstu ábyrgd av, hvussu væl TAKS umsitur hesa uppgávu. Hóast tað, hevur stjórin á Heilsutrygd ikki atgongd til inntøkujáttanina og skrásetingar í Búskaparskipan Landsins, sum hava við heilsutrygdargjaldið at gera. Vald og gjald fylgjast sostatt ikki at í hesum føri, og er tað óheppið.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við lógaruppskotinum er at flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldinum til TAKS at umsita. Við hesi broyting fara vald og gjald eisini at fylgjast, umframt at tað verður greiðari fyri borgaran, sum frameftir hevur ein almennan stovn at venda sær til, heldur enn tveir ymiskar, sum tað er við verandi skipan.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við verandi lóggávu krevur TAKS heilsutrygdargjaldið inn fyri Heilsutrygd, meðan Heilsutrygd ber kostnaðin av hesum. Við lógarbroytingini verður hetta broytt, soleiðis at TAKS, umframt innkrevjing av heilsutrygdargjaldinum, eisini hevur ábyrgdina av hesum. Heilsutrygd skal sostatt heldur ikki framyvir gjalda TAKS fyri hesa uppgávu. Samsvar fæst eisini millum vald og gjald, við tað at stjórin hjá TAKS framyvir bæði hevur ábyrgdina av hesari uppgávuna, umframt ber kostnaðin av hesum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Heilsutrygd
TAKS
Fíggjarmálaráðið
Antares
Pam Offshore
Navigare

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógarbroytingin er útreiðsluneutral.

Áður hevur TAKS sent rokningar til Heilsutrygd fyri innkrevjing av heilsutrygdargjaldinum. Eftir broytingina metir TAKS seg hava tørv á umleið 2 mió. kr. í játtan í 2026 til endamálið. Hendan játtan verður frá 1. januar 2026 flutt frá Heilsutrygd til TAKS.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri TAKS. Arbeiðsuppgávur fara at leggjast afturat hjá TAKS í sambandi við yvirtøkuna av uppgávuni, og fara varandi at krevja meira arbeiðsorku hjá TAKS.

Lógaruppskotið hevur jaligar umsitingarligar avleiðingar fyri Heilsutrygd, við tað at arbeiðsuppgávur verða fluttar frá Heilsutrygd til TAKS.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
**1) Hoyvíkssáttmálin**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

**2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

**3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

**2.9. Markaforðingar**
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing ella fyrisitingarligar sektir. Tó er ásett í § 26, stk. 2, at um ein persónur hevur givið TAKS skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum

hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki áseting um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið gevur TAKS heimild til at innkrevja heilsutrygdargjald.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1**
*§ 24, stk. 2, 2. pkt*
Sambært Nordisk konvention om social sikring kunnu persónar sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald, um teir rinda til sosiala skipan í einum øðrum Norðurlandi. Tá ein umsøkjari ikki longur rindar heilsutrygdargjald í einum øðrum Norðurlandi, skal hann boða TAKS frá hesum, tí tá skal viðkomandi aftur rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

**Til nr. 2**
*§ 24, stk. 3, 2. pkt.*
TAKS krevur heilsutrygdargjaldið inn, umframt at TAKS eisini ber kostnaðin av hesum.

**Til nr. 3**
*§ 26, stk. 2*
Um ein persónur hevur givið TAKS skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2, kann TAKS eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið. Gjaldið kann krevjast við at afturhalda løn v.m., eftir reglunum um innkrevjing av persónligum skatti.

**Til § 2**
Lógarbroytingin um at flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita, kemur í gildi 1. januar 2026.

Heilsumálaráðið 26.09.2025

**Súsanna Bertholdsen**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur